# GÓÐ TÍÐINDI

„Men av Honum eru tit, í Kristi Jesusi
– sum er vorðin okkum vísdómur frá Gudi,
rættvísi, heilaggering og endurloysing,“
1. Kor. 1.30

NR. 6 / NOVEMBER 2025 / ÁRGANGUR 34



## Um H. A. Ironside

Greinin, „Rangur og rættur heilagleiki“ er brot, sum er tikið úr bókini hjá H. A. Ironside, „Holiness, the False and the True".

H. A. Ironside var amerikanskur bíbliugreinari, pastorur, gudfrøðingur og høvundur. Hann var kendur sum sera bíbliutrúgvur prædikumaður og verður av mongum mettur sum ein av heimsins størstu bíbliulærarum. Hann hevur ferðast kring heimin og hevur prædikað fyri mongum túsundum og hevur skrivað viðmerkingar (Commentaries) um fleiri enn 50 bøkur í Bíbliuni og eisini nógvar aðrar andaligar bøkur, sum verða nógv lisnar enn í dag.

Henry (Harry) Allan Ironside (1876-1951) varð føddur í Toronto í Kanada. Foreldrini fluttu til Kanada úr Skotlandi. Pápin doyði, áðrenn Harry var 2 ára gamal. Longu 4 ára gamal byrjaði hann at lesa og læra seg bíbliuvers uttanat.

Tá ið Harry var 10 ára gamal, flutti familjan til Los Angeles í Kalifornia. Tvey ár seinni stovnaði hann ein sunnudagsskúla og lærdi børnini í grannalagnum úr Bíbliuni, sum hann longu tá hevði lisið ígjøgnum tíggju ferðir. Men tað var ikki, fyrr enn hann var 14 ára gamal, at hann varð heilt og fult sannførdur um frelsu Guds við trúgv á Jesus Kristus.

# Rangur og rættur heilagleiki

**H. A. Ironside – J. í Skemmuni týddi.**

Stutt eftir, at eg var umvendur, fekk eg áhuga fyri teimum sokallaðu „heilaggeringarmøtunum“. Á teimum møtunum varð nevniliga tosað um eina serliga uppliving, sum eg kendi á mær, var júst tað, sum mær tørvaði. Upplivingin hevði ymisk nøvn, so sum: „Hin seinna signingin“, „Fullkomin heilaggering“, „Fullkomin kærleiki“, „Hitt hægra lívið“, „Reinsan frá syndafullu náttúruni“ o.s.fr.

Treytirnar fyri at fáa lut í hesi „signing“ eru fyrst og fremst ein neyð og ein longsil eftir heilagleika – júst sum tú í fyrstani vart í neyð um frelsu fyri sál tíni. Síðan: Fult yvirgivni til Gud á vígslunnar altari. Og til seinast mást tú í trúgv taka ímóti Heilaga Andanum sum einum reinsandi eldi, sum brennir alla synd burtur, og sum fullkomiliga ger til einkis allar óreinar lystir og hvørja girnd, soleiðis at hin heilaggjørda sálin er fullkomin í kærleika og eins rein, sum Ádam var áðrenn syndafallið. Tá ið tú hevur fingið hesa undurfullu signing, mást tú kortini ansa væl eftir, at tú ikki verður tikin á bóli av Djevulinum, eins og Eva varð í urtagarðinum Eden, og á tann hátt fært tað illa í teg aftur.

Soleiðis varð lært! Og afturat hesum hoyrdu vit grípandi vitnisburðir, sum vóru so framúrskarandi, at eg ivaðist ikki í, at teir vóru sannir. Eg var vísur í, at henda signing, sum onnur nutu, var eisini fyri meg, um eg bert leyk treytirnar.

### Helt, at hetta var Heilagi Andin

Eitt leygarkvøld gjørdi eg av at fara út á landið at bíða eftir Gudi og ikki fara heim aftur, fyrr enn eg hevði fingið signingina. Eg fór við tokinum klokkan 11 um kvøldið til eina fjarskotna støð eini 20 km frá Los Angeles. Aftan fyri eitt træ við ein upptornaðan áarløk fall eg á knæ og bað eldhugaður og inniliga í fleiri tímar. Eg bønaði Gud um at vísa mær alt, sum kundi forða mær at fáa signingina. Eg kom at hugsa um mangt og hvat, sum eg ikki kann nevna her. Eg stríddist og rópti at enda: „Harri, eg lati Tær alt upp í hendur – alt, hvørt menniskja, hvørja gleði, sum forðar mær at liva heilt fyri Teg. Harri, gev mær nú signingina!“

Tá ið eg í dag líti aftur um bak, eri eg sannførdur um, at eg var fult yvirgivin vilja Guds í tann mun, sum eg skilti tað. Men sálarligi spenningurin hesa longu náttina og ógvisligi ófriðurin mánaðirnar frammanundan høvdu so fullkomiliga pøst meg, at eg fall nærum í óviti til jarðar. Men brádliga kendist tað, sum ein heiløg gleði fylti meg. Eg helt, at hetta var Heilagi Andin, sum floymdi inn í hjarta mítt. Lukkuligur rópti eg: „Harri, eg trúgvi, at Tú kemur inn nú. Tú reinsar meg frá allari synd. Eg taki ímóti tí nú. Verkið er liðugt! – Eg eri heilaggjørdur við blóði Tínum. Tú gert meg heilagan. Eg trúgvi, eg trúgvi!“ Eg var ósigiliga lukkuligur. Eg kendi á mær, at bardagi mín umsíðir var stríddur til fulnar.

Oyðimarkarferðin var av, og nú var eg komin inn í lovaða landið. Aldri aftur fór eg at verða plágaður av innvortis hugi til at synda. Hjarta mítt var reint. Nú eg ikki hevði nakran fígginda í mær innvortis, kundi eg brúka alla mína orku og kraft at vinna á útvortis fíggindunum.

Tað helt eg – men á, sum eg hevði lítla vitan um meg sjálvan og enn minni um sinni Guds.

### Mín egna uppliving stóra umrøðuevnið

Í fleiri mánaðir livdi eg kortini í eini dreymastøðu, fullur av gleði um mítt frælsi frá synd. Kvøld eftir kvøld fór eg á møtir, vitnaði á gøtum og inni í møtisalinum. Men ein broyting tyktist vera komin í mínar „vitnisburðir“. Áðrenn eg hevði hesa upplivingina, hevði eg altíð roynt at gjørt Kristus stóran og peikað á Hann. Men nú var tað mín egna uppliving, sum var mítt stóra umrøðuevni, og eg setti meg sjálvan fram sum eitt lýsandi dømi um halgan og heilagleika. Í veruleikanum sermerkti hetta tey flestu „framkomnu“ kristnu á okkara

møtum. Tey yngstu í náðini gjørdu Kristus stóran. Tey „heilaggjørdu“ upphevjaðu seg sjálv.

Eg var 18-19 ára gamal, tá ið eg fór at ivast, um eg nú hevði nátt so høgt andaligt støði, sum eg hevði sagt meg vera komnan til. Tað, sum hetta hevði við sær, er ov persónligt og eymt at siga frá her. Men eg helt fram at knossast við at krossfesta meg sjálvan, sum tó bert hevði fleiri vónbrot og beiska sorg við sær. Hetta hjálpti mær tó at viðurkenna, at *læran um oyðing av gomlu náttúruni var, øll sum hon er, ein ússalig villleiðing.*

## Bjargingin

Bjargingin kom at enda á ein óvæntaðan hátt. Ein kvinnuligur loytnantur í Frelsunarherinum varð send til heilsubótarheimið tætt við Oakland, har eg sjálvur var staddur fyri at koma fyri meg aftur av tí, at eg næstan var vorðin eitt nervavrak. Hesin loytnanturin lá nú til at doyggja av krabbameini. Í mínum eygum var hon ein pínslarváttur, sum nú gav lív sítt fyri ein fortaptan heim. Eg var nógv saman við henni og kundi ikki koma til nakra aðra niðurstøðu, enn at hon var einasti veruliga heilaggjørdi persónurin á staðnum.

Men eg varð stórliga bilsin, tá ið hon eitt kvøldið bað meg lesa fyri sær. Hon var komin í andaliga neyð. Eg visti ikki, hvat eg skuldi lesa fyri henni. Knappliga kom eg at hugsa um ein lítlan bókling, sum mamma mín einaferð hevði givið mær, men sum eg ongantíð hevði torað at lisið, av tí at eg var ræddur fyri, at hann fór at vera í stríð við heilaggeringarlæruna, sum eg var lærdur upp í. Og nú las eg eina síðu fyri og aðra eftir í vón um, at hetta fór at veita hesi doyggjandi kvinnuni linna og ugga. – Bóklingurin legði dent á, hvussu fortapt øll menniskju eru av náttúru. Hann helt fram við endurloysingini í Kristusi við deyða Hansara. So helt eg fram at lesa um tær báðar náttúrur hins trúgvandi og æviga tryggleikan í Kristusi, sum tyktist mær bæði láturligt og høpisleyst. Seinasti parturin av bóklinginum var um profetiini, sum vit tó ikki lósu.

Eg var ovfarin av brádliga at hoyra hana siga, eftir at vit høvdu lisið fyrra helming av bóklinginum: „Trýrt tú veruliga, at hatta er satt? Á, hevði eg bara kunnað trúð tí, so hevði eg kunnað doyð í friði.“

Bilsin spurdi eg hana: „Meinar tú veruliga, at tú ikki kanst doyggja í friði, soleiðis sum tú hevur tað? Tú ert jú bæði rættvísgjørd og heilaggjørd!“

„Eg havi tað stak vánaligt,“ svaraði hon, „og tú mást ikki siga, at eg eri heilaggjørd. Eg havi stríðst og strevast í mong ár, men eg havi ikki rokkið henni enn. Tí vildi eg tosa við teg.“

Eg minnist, at tað brast úr mær: „Sig mær, hvat er galið við okkum? Eingin avnoktar seg sjálvan meiri fyri Kristi skuld enn vit. Vit líða og svølta og slíta okkum upp fyri at gera vilja Guds, og kortini hava vit ongan varandi frið!“

## Fullkomin heilagleiki og fullkomin kærleiki í Kristi Jesusi eina

Í mínum ráðaloysi fór eg til ein Orðsins tænara, sum eg skilti hevði samfelag við høvundan av bóklinginum, sum eg hevði lisið. Nú gjørdist mær greitt, at bæði heilagleiki, fullkomin kærleiki, rættvísi og øll onnur signing var mín í *Kristusi* frá tí løtu, eg kom til trúgv. Hetta var longu æviga ogn mín bert av *náði*. Eg hevði alla tíðina fest eygu míni á skeivt menniskja – meg sjálvan. Alt hetta var givið mær í einum øðrum menniskja, einasta sanna Menniskjanum – Jesusi Kristi. Men tað tók mær vikur at fata hetta.

Ljósið rann eisini upp fyri doyggjandi loytnantinum, tá ið hon skilti, at hon var æviga sameind við Kristus sum høvd og hevði ævigt lív í Honum sum hinum sanna víntræi, har hon var ein av greinunum. Gleði hennara kendi eingi mørk. Heilsustøða hennara bleiv betri frá tí løtu, og hon livdi 6 ár afturat og varð síðan tikin heim til Harran eftir at hava slitið seg upp við at leiða onnur til Kristus.

Nú kendi eg á mær, at eg kundi ikki halda fram í hesi skipan, sum eg var í. Eftir lítlari viku var eg farin úr tí einastu menniskjaskaptu skipan, sum eg nakrantíð havi verið í sum trúgvandi, og í mong ár havi eg ikki kent nakað annað høvd enn Kristus og einki annað likam enn ta samkomu, sum Hann keypti við Sínum egna blóði. Hetta hava verið eydnurík ár. Og tá ið eg líti aftur á leiðina, ið Harrin hevur leitt meg, kann eg bert prísa Honum, sum loysti meg frá sjálvgóðsku og sjálvskoðan og lææt meg síggja, at fullkomin heilagleiki og fullkomin kærleiki er ikki í mær, men í *Kristi Jesusi eina*.

(Úrdráttur úr bókini „Holiness, the False and the True“ eftir H.A. Ironside, sum Jørn Herm. Nielsen hevur skrivað á donskum).


GÓÐ TÍÐINDI NR. 6

Útgevari: Góð Tíðindi
Konto í Betri: 9181 5604941
Ábyrgd: John í Skemmuni
Umbrot: Anna Simonsen
Prent: Føroyaprent
Blaðið fæst ókeypis ymsastaðni.
Vendið tykkum til John um fleiri eintøk.
Blaðið kann eisini lesast á evr.fo

*Hjartans tøkk fyri forbøn og stuðul.*


# Hann tekur ei gleðina frá tær



Trygve Bjerkreheim

Tað eru tey, sum halda, at um tú kemur til persónliga trúgv á Jesus, so missir tú gleðina og alt tað vakra, sum í hesum heimi er.

Men veruleikin er júst hin øvugti. Tí tástani byrjar tú veruliga at liva. Og tá ið tú møtir mótgongd, kanst tú hvíla í friði, tí tú veitst, at í trúnni á Jesus ert tú tryggur. Hann hevur lovað at verða við tær alt lívið og at koma aftur skjótt ein dag at taka teg og øll onnur, sum hava sett sítt álit á Hann heim til Sín; og bíðar Jesus við at koma, hevur Hann lovað at leiða teg gjøgnum deyðaskuggans dal og inn í undurfulla Himmal Sín.

Hetta er boðskapurin í kenda norska sanginum, sum Trygve Bjerkreheim yrkti, og Edmund í Garði týddi til føroyskt:

Hann tekur ei gleðina frá tær,
tann Jesus, ið kallar á teg.
Bert tá kanst av sonnum tú liva,
um hann kann tær fylgja á veg.

Í bókini „Søgur um sangir“ skrivar Petur Háberg um upprunan til sangin:

Trygve Bjerkreheim var føddur í 1904. Hann vaks upp í einum góðum kristnum heimi, har foreldrini vóru honum ein sonn kristin fyrimynd. Á tí, sum var kallað Kinamisjonens Ungdomsskole, gjørdist hann 16 ára gamal ein livandi kristin. Hann tók prógv sum gudfrøðingur við Menighetsfakultetet. Hann hevur verið blaðstjóri, og sagt verður um hann, at hann sjálvur og alt, sum hann tekst við,

# Jesus elskar teg

Marita Nystrøm

Undir seinna heimskríggi vóru nógvir bretskir hermenn í Føroyum. Nakrir funnu sær konu her og fluttu aftur til Bretlands. Ein teirra var bretin, Jimmy Copland, sum fann sær konu úr Havn – Bjørgu Jensen (á Dul). Jimmy Copland var trúgvandi maður. Tey møttust í Ebenezer, har hann eisini hevði vitnisburð, tá ið høvi beyðst.

Jimmy og Bjørga giftust undir krígnum og fluttu til Skotlands, har tey búðu alla ævi sína. Jimmy hækkaði í tign og bleiv majorur í bretska herinum.

Byrjanin av lívinum hjá Jimmy var ikki mjúk. Jimmy mintist ikki pápa sín, tí hann andaðist longu, meðan Jimmy var smádrongur. Jimmy hevði eina systur, sum var trý ár yngri enn hann.

Tá ið Jimmy var 5 ára gamal, andaðist mamman av sjúku. Tað einasta, sum hann mintist til hana, var, tá ið hon bleiv borin út úr heimi teirra.

Børnini fóru síðan á barnaheim. Seinni, tá ið tey vórðu størri, varð systirin send á eitt barnaheim fyri gentur og Jimmy á eitt annað fyri dreingir. Soleiðis blivu tey atskild og mistu alt samband við hvørt annað.

Jimmy treivst illa á barnaheiminum. Hann var sera ólukkuligur og græt seg ofta í svøvn. Hann kendi tað, sum eingin var, sum var góður við hann, og sum elskaði hann.

Men har á heiminum var ein kvøldvakt, ein kvinna, sum legði merki til henda ólukkuliga dreingin, og sum royndi at ugga hann. Hvørt kvøld, tá ið hann fór til songar, ballaði hon hann og teskaði honum eymt í oyrað: „Jesus elskar teg."

Hann fór nú at hugsa um, hvør ið hesin Jesus mundi vera. Mundi hann búgva tætt við barnaheimið, hinumegin gøtuna. Hann visti als einki um Jesus, men setti sær fyri at finna Hann.

Sum tíðin leið, kom hann í sunnudagsskúla og hoyrdi nú um Jesus, sum varð føddur til jarðar fyri at frelsa heimin. Har hoyrdi hann um kærleika Guds og um Jesus, sum elskaði hann, og sum doyði fyri hann á Golgata krossi.

Hann tók ímóti hesum kærleika Guds og kom til trúgv á Jesus. Hann kom nú at kenna Hann, sum hann hevði hoyrt um sum barn, sum elskaði hann, og sum gav Seg sjálvan fyri hann (Gal. 2.20).

Hetta broytti lív hansara fullkomiliga. Eftir hetta varð hann eitt satt vitni um Guds kærleika og læt tað skína ígjøgnum allastaðni, bæði heima og til arbeiðis, og hvar hann so kom.



*Bjørga Jensen (á Dul) og Jimmy Copland*

Jimmy fór so at leita eftir systur síni, og umsíðir fann hann hana. Tá var hon blivin sjúk og andaðist bert nakrar mánaðir seinni. Í hesum stutta skeiði, sum tey fingu saman, vitnaði hann fyri henni og segði tað sama við hana, sum kvinnan, ið legði hann at sova, tá ið hann var smádrongur, hevði sagt við hann: „Jesus elskar teg." Og systirin kom til trúgv á Jesus, áðrenn hon andaðist.

So stóran týdning kunnu so fá orð hava fyri eitt menniskja.

andar av friði, og at hann hevur evni at skapa ljós á kristnari lívsleið.

Men Signa Edland í Vinje í Telemørkini var tann, ið gav íblástur til sangin „Hann tek ikkje glansen av livet"! Hon kom til trúgv á Jesus á ungum árum. Hon var eins og náttúran, har hon vaks upp, bæði heima og uppi við fjallabúðina: Lívsfrísk, ærlig, stórsinnað og sterk, ektað og náttúrlig. Tað vísti seg, sum at øll vóru góð við hana. Einaferð skal hon hava sagt: „Eingin skal síggja meg fella tár, sjálvt um eg skuldi doyð ung." Hon starvaðist við skúlan í Vinje, og børnini vóru so serstaka góð við hana.

Trygve Bjerkrheim sigur frá, at hann fór at vitja hana, tá ið hon var løgd á sjúkrahús. Hann visti, at hon hevði fingið krabbamein og stúrdi eitt sindur at fara inn. Men hon var so ljós og glað, so hetta varð heldur ein fagnaðarstund enn ein sorgarstund. Hon var 45 ár.

„Eg var biðin um at koma til Nissedal í sambandi við 17. mai-dagshaldið. Hesin dagur var miðskeiðis í vikuni, so tað lá væl fyri at gera eitt rend norður til Vinje fyri at vita, hvussu Signa hevði tað. So sunnudagin fyri 17. mai fór eg norður, og gjørdi eg tað ikki tá, hevði ikki eydnast mær at sæð hana á lívi.

Hon var uppi, tá ið eg kom, og vit høvdu eitt hugnaligt kvøld; men morgunin eftir skilti eg, at hon var versnað nógv um náttina. Tey stóðu um song hennara, og onkur nevndi, at nú var hon skjótt í einum betri landi, har eingin líðing, sorg og pína vóru. Tá svaraði hon: „Eg haldi nú, at tað hevur bara verið gott at liva her eisini!" Hon hevði sagt við eina unga kvinnu, sum var um hana: „Du skulle vert ein kristen, for Jesus tek ikkje glansen av livet!""

Signa andaðist skjótt, og morgunin eftir fór Trygve Bjerkrheim við bussleiðini. Hann skifti í Kviteseid og noyddist at steðga har eina løtu, og har nýtti hann tíðina til at skriva sangin, sum í veruleikanum er ein vitnisburður frá Signu Edland."

Hann tekur ei gleðina frá tær,
tann Jesus, ið kallar á teg.
Bert tá kanst av sonnum tú liva,
um hann kann tær fylgja á veg.

Tú hoyrir tær dárandi røddir,
ið lova tær glitur og gleim,
men eingin ber ljós yvir vegin
sum hann, ið bar kærleik í heim.

Hann hjálpir í brattastu líðum
og styðjar, um gøtan er hál,
hann signar tær sólfyltu fløtur
og leiðir teg sjálvur á mál.

Hann førir teg frelstan um fjørðin,
heilt inn á ta himmalsku strond,
og fjalist tín bátur í brotum,
hann rættir tær bjargandi hond.

Hann tekur ei gleðina frá tær,
hann gyllir tær gleði og sorg
og letur upp ljósastu salir
til høgtíð í Himmalsins borg.



# Vitnisburður: Marita Nystrøm

Marita er fødd og uppvaksin í Klaksvík. Foreldur hennara vóru Alexandra og Páll á Dul, og systkin hennara eru Sára og Agnar.

Marita gekk í skúla í Klaksvík. Hetta var stórur skúli við nógvum næmingum. Seinastu trý árini gekk hon í realskúla.

Marita er sjónveik, og hesin veikleiki hevði tað við sær, at hon sá ikki upp á talvuna. Tíverri tóku lærararnir ikki atlit til hetta, men Marita hevði eina góða vinkonu, sum øll árini sat við lið hennara og teskaði henni í oyrað, hvat ið varð skrivað á talvuna.

Pápi Maritu dugdi enskt og týskt raðið og hjálpti henni við tí, sum hon hevði fyri. Hann las dagliga við henni, og onnur komu eisini inn til teirra at verða við til hesa heimaundirvísing. Hetta var serliga, tá ið próvtøkurnar vóru fyri.

Foreldrini komu í samkomuna í Betesda, og har kom Marita í sunnudagsskúla og á møti. Pápin var ein av ábyrgdarbrøðrunum í samkomuni, og fólk komu ofta inn til teirra at tosa við pápan.

Dreymur Maritu var at gerast sjúkrasystir. Í hesum sambandi fór hon fyrst í húspláss í Danmark. Síðan kom hon heim aftur og fór at arbeiða sum gongsgenta á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Tá ið Marita søkti inn at læra til sjúkrasystur, var heilsuváttan eisini kravd, og har stóð, at hon var sjónveik. Orsakað av hesum slapp hon ikki at læra til sjúkrasystur, og tað var hon sera hørm um.

Marita og Jón Nystrøm komu at kennast í ungdóminum og blivu væl. Jón er føddur og uppvaksin í Klaksvík. 15 ára gamal fór hann í málaralæru hjá Poul Færø og arbeiddi sum málari í mong ár.

Marita og Jón giftust í 1972. Sama ár fluttu tey í egin hús í Klaksvík, sum tey høvdu latið byggja. Tey eiga tríggjar gentur, sum eita Ann-Mari, Ansa og Marjun.

Seinast í 1980-unum fekk Marita arbeiði í Dansk Blindesamfund. Í hesum sambandi var hon í Danmark tvær ferðir um árið, har hon fekk ymsa frálæru. Hon ferðaðist á hvørjum ári her heima kring oyggjarnar og vitjaði tey blindu.

Í 1990-unum vóru Marita og Jón nøkur skifti niðri á Malta í Hirtshals, meðan Levi Joensen var heima í Føroyum. Fyrstu ferð var veturin 1992-93. Hetta var ein strævin tíð orsakað av fíggjarkreppuni, sum hevði rakt Føroyar. Nógvir føroyingar, sum høvdu mist hús og heim, fluttu til Danmarkar. Marita og Jón royndu at hjálpa teimum, sum leitaðu sær hjálp á Malta. Veturin 93-94 var serliga nógv at gera. Síðan vóru tey aftur og loystu av veturin 95-96.

Seinnu helvt av 90-unum fór Jón at sigla út frá Hirtshals við uppsjóvarskipinum Ruth. Og um ár 2000 fluttu tey til Hirtshals at búgva, har tey keyptu sær hús.

Øll familjan býr í dag í Hirtshals. Marita og Jón trívast væl í Hirtshals og koma regluliga í samkomuna á Malta.

## Marita greiðir frá umvending síni:

„Eg eri vaksin upp í einum heimi, sum var merkt av, at foreldrini vóru trúgvandi; og tí kann eg siga, sum Líggjas á Váli yrkti og syngur: „So langt, eg kann minnast, so havi eg hoyrt um náði og frelsu og frið, …“

Eg gekk í sunnudagsskúla og á møti, har eg hoyrdi Guds orð. Soleiðis varð eitt grundarlag lagt í hjarta mítt heilt frá barnsbeini.

Jólaaftan, tá ið eg var 8 ára gomul, vitjaðu vit um kvøldið abba mín, Jens Klæmint Isaksen. Hetta gjørdu vit hvørji jól. Eg takkaði øllum, sum vóru har, fyri jólagávurnar – einum fyri og øðrum eftir. So kom eg til abba, sum spurdi meg, um eg hevði takkað fyri ta størstu jólagávuna. Eg segði, at eg var vís í, at eg hevði takkað øllum. Men so segði hann: „Men hví halda vit jól?“ So fór hann at tosa um, hví Jesus varð føddur, at Hann kom til jarðar fyri at frelsa okkum, og at hetta var stóra gáva Guds til okkara.

Vit fóru so upp á loft, og har løgdu vit okkum á knæ. Abbi var gamal tá, og eg minnist, hvussu torført hann hevði við at leggja seg á knæ. Hann bað so, og síðan takkaði eg Jesusi fyri, at Hann var deyður fyri meg, og at eg við trúgv á Hann hevði ævigt lív.

Tá gjørdist greitt fyri mær, at eg kom ikki inn í Himmalin við at hanga uppi í teimum gomlu, men at hetta var persónligt fyri meg.

Pápi mín var ikki við hetta kvøldið orsakað av sjúku. Hann hevur seinni sagt mær, at tá ið eg hetta kvøldið kom heim aftur, var eg so glað, at eg kastaði meg í føvning hansara og segði, at nú var eg frelst.

Eg hevði tað gott eftir hetta. Men eftir, at eg hevði átt mítt fyrsta barn – eg var tá um 20 ára gomul – kom ivi á meg, og eg fór at hugsa, um eg mundi vera frelst. Hetta stóð við eina tíð, og eg var sera órógvað av hesum. Eg vaknaði við hesum iva og sovnaði við honum.

So var tað einaferð, eg fór á møti, at eg bað Gud um, at eg ikki skuldi koma heim aftur uttan at hava fingið frelsuvissu. Eg fylgdist við pápa heim aftur, men hevði ikki dirvi at siga honum, hvussu eg hevði tað, og skiltust vit soleiðis.

So kom eg fram við húsunum hjá Kaj Johannesen og sá, at har var ljós. Eg tók mót til mín og gekk so upp trappurnar og bankaði uppá. Kaj kom í dyrnar og segði: „Tú ert ikki ørindaleys.“ – Eg hugdi upp á hann og segði: „Eg veit ikki, um eg eri frelst!“ So hugdi eg niður aftur og hugsaði, hvat hann nú mundi hugsa um meg. Eg hugdi so upp aftur og sá inn í hansara mildu, kærleiksfullu eygu. Hann bað meg koma inn. Hann tók so Bíbliuna og sló upp á Fyrsta brævi Jóhannesar 5.12-13, har vit lesa:

*„Tann, ið hevur Sonin, hevur lívið; tann, ið ikki hevur Son Guds, hevur ikki lívið. Hetta havi eg skrivað til tykkara, fyri at tit skulu vita, at tit hava ævigt lív, tit, ið trúgva á navn Guds Sonar.“*

Hann tosaði so við meg og legði seg síðan á knæ og bað fyri mær, at Harrin skuldi geva mær frelsuvissuna og gleðina aftur. Og eg fekk frelsuvissu hetta kvøldið og havi ongantíð ivast síðan tá.

Tað hevur verið gott ígjøgnum lívið at hava Jesus sum vin og frelsara. Vit fara øll fyrr ella seinni ígjøgnum royndir, og vit eru heldur ikki sloppin undan teimum.

Fyri góðum 5 árum síðan var maður mín, Jón, hart raktur av sjúku. Læknarnir góvu okkum millum lítla og onga vón. Tað snúði seg bæði um búkspýttkertilin og annað nýrað, sum vóru rakt. Hann fór í respirator og var uttan vit í 6 vikur. Hann var so ómetaliga veikur og var í viðgerð í langa tíð.

Við nógvari hjálp og venjing kom hann fyri seg aftur, men tað tók í hvussu so er hálvtannað ár. Eftir umstøðunum hevur hann tað gott, og vit eru Harranum ómetaliga takksom fyri tað.

Fyri hálvumøðrum ári síðan varð eisini eg sjálv hart rakt av krabbameini. Eg fekk tarmkrabba og mátti í skundi leggjast undir skurð. Eg havi fingið stomi, sum eg má liva við restina av lívinum.

Tað, sum eg ofta havi hugsað um, er, hvussu væl eg eri komin ígjøgnum lívið við mínum trupulleikum og hesum, at eg havi so veika sjón. Eg havi ongantíð verið beisk um tað, men eri tvørturímóti takksom fyri mongu árini, ið eg fekk høvi til at arbeiða ímillum blind í Føroyum.

Í øllum hesum umstøðum og royndum havi eg kent frið Guds, og eg eri takksom fyri, hvussu Hann hevur signað og varðveitt meg og okkum.

* * *

Ynski og bøn mín er, at eg kann vera til signing fyri onnur, og at tú, sum lesur henda vitnisburð og ikki ert eitt Guds barn, skalt koma at kenna Jesus sum Frelsara tín.“